


www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 06 - 2012

# Oljuíløgur met í Norra í 2013

Nýggj tøl frá norsku hagstovuni benda á, at íløgurnar í norsku olju- og gassvinnuna verða 194,3 milliardir krónur næsta ár. Hetta er nýtt met og verður mett sum eitt týðiligt tekin um, at vinnan er merkt av bjartskygni. Tær størstu íløgurnar í 2013 skulu gerast á Goliat, Eldfisk II og Edvard Grieg-leiðunum, men feløgini fara eisini at gera stórar íløgur í leiðum, sum eru í framleiðslu og serstakliga í Troll, Ekofisk Oseberg og Åsgard. Men íløgurnar eru eisini sera stórar í hesum árinum. Oljufeløgini hava mett, at íløgurnar í gass- og oljuvirksemið koma upp á 186,6 milliardir krónur í ár ella góðar 40 milliardir krónur meiri enn í 2011. Íløgurnar fara serliga til verandi framleiðsluleiðir og til at menna nýggjar leiðir, men feløgini brúka eisini meiri pengar til leiting í ár. Hinvegin verða íløgurnar í virksemið á landi og til rørleiðingar minni í ár enn í fjør, skrivar Aftenbladet. Mynd Methøgu íløgurnar í norsku oljuvinnuni næsta ár fara eisini at gagna føroyingum, sum arbeiða í norsku vinnuni. Her føroyingar, sum arbeiða umborð á Cosl Innofater, systurpallur til Cosl Pioneer, ið borar á føroyska landgrunninum